


*Nr. 3* *31. januar 2016* *76. árg.*

# Rættvísgjørd av trúgv

*Rættvísgjørd av trúgv hava vit tí frið við Gud við harra okkara, Jesusi Kristi, sum vit við trúnni eisini hava fingið atgongd við til hesa náðina, sum vit standa í.*

*Róm. 5,1-2.*

Á einum bíbliutíma varð hesin spurningin havdur á lofti: “Kann eitt menniskja hava lut í Guds náði uttan at hava frið við Gud?

Summi halda hetta kanska vera ein sniðfundigan spurning. Slíkt kann bara hava áhuga hjá teimum, sum hava tíð og áhuga fyri teoretiskum spurningum. Tað er á ein hátt rætt. Í Andans heimi skal ein vara seg fyri at koma við teoretiskum frágreiðingum. “Vindurin blæsur, hvagar hann vil, og tú hoyrir dunið av honum; men tú veitst ikki, hvaðan hann kemur, og hvagar hann fer; soleiðis er tað við einum og hvørjum, sum er føddur av andanum. (Jóh. 3,8) Soleiðis svaraði Jesus Nikodemusi, tá ið hann royndi at seta Jesus fastan í orðum.

Men tá ið tað er sagt, má viðgangast, at mong leita eftir hvílu. Í taluni um Guds frið, sum ber av øllum viti, siga tey: men vit vita onki um henda friðin. Hvat er tað fyri friður? Hvat bagir okkum, at vit ikki kunna finna hann?

Tað er ikki av tilvild, at eitt av kendastu og hægst mettu orðunum hjá Jesusi eru hesi: “Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu.” Hetta kann ikki miskiljast. Hann sigur: “Komið!” Og hann lovar, at vit skulu fáa hvílu.

Men friðurin og hvíldin eru í **honum**. Hvussu tað nú er við hesum friðinum, og hvussu lítið ella nógv vit merkja til

hansara, hevur minni at siga. Friður við Gud er ein støða, sum **hann** upprættaði, og hann, friðurin, verður óuppiborin givin einum og hvørjum, sum geva honum rætt og vald. Dyrnar standa opnar, og vit kunna fara innar. Vit mugu flyta út úr okkara egna og inn ígjøgnum opnu dyrnar, inn til hansara. Har hann fær ræðið, gerst hjartað nøgt.

Samanhanginum millum náði og frið frá Gudi, Faðiri okkara, og Harranum Jesusi Kristi, kann bara Heilagi Andin greiða einum menniskja frá. Hann knýtir samband millum himmal og jørð. Hann sannførir okkum um, at hóast hjartað fordømir okkum, kann tað kortini gerast nøgt, tí at Guds náði vigar meira enn allar syndir okkara.

*Jesus, mín trúfasti Harri og kongur,*
*øllum, tú vanst mær, eg taki ímót!*
*Ei vil eg tærast av ivanum longur;*
*tú hevur lovað at leiða mín fót.*

# Higartil hevur Harrin hjálpt

Rithøvundurin Alex Haley hevði eina serliga mynd hangandi á bróstinum í skrivstovu síni. Á myndini var ein skjaldbøka, sum sat ovast á einum hegnpela.Tá ið hann varð spurdur, hví hann hevði hasa myndina á skrivstovuni, svaraði hann: "Hvørja ferð, eg skrivi okkurt týdningarmikið, ella lesi tað, eg havi skrivað og haldi tað sita væl, og eg gerist errin av mær sjálvum, hyggi eg at skjaldbøkuni ovast á hegnpelanum. Eg hugsi um, at upp hagar er hon ikki komin við egnari megi. Hon má hava fingið hjálp.

Hetta er grundarlagið undir øllum takksemi – at Gud hevur hjálpt okkum higar, sum vit eru komin, og at hann hevur givið okkum alla ta signing, sum vit eiga.

Alex Haley hevði myndina av skjaldbøkuni á einum hegnpela, fyri at minna seg á at vera takksaman. Sámuel í Gamla Testamenti í Bíbliuni gjørdi tað á ein annan hátt. Tá tók Sámuel stein og reisti hann....Henda steinin kallaði hann Ebenezer og segði: "Higartil hevur Harrin hjálpt okkum." (1.Sám. 7,12).

---

Rættvísi uttan miskennsemi leiðir til harðskap. *e.c.* ums.

# Hann, sum kemur

Tann Gud, sum er og var, er eisini tann Gud, sum kemur. Framtíðin er hansara! Jóhannes ápostul sá tað í miklum sjónum, eitt øgiligt stríð um heimsvaldið í framtíðini; men hann sá eisini, at Jesus Kristus gjørdist sigursharrin. Hann sigraði, og himmalsins herar fylgdu honum. Sum Kristus vann hann sigur, tá ið hann gekk her á fold, og soleiðis fer hann í komandi døgum at sigra.

Tá ið einaferð dregur at hinum seinasta og avgerandi stríðnum millum ljósið og myrkrið, millum lívið og deyðan, Gud og Satan, himmal og helviti, tá skal Kristus koma við sínum veldigu herum. Tá skal hann koma í tign og dýrd, og tá ið hann kemur, skal hann sigra.

Bara við andadrátti munn síns skal hann týna Antikristus. Hann kemur skjótt, hann kemur! O, tann gleðiligi sannleiki hjá øllum Guds børnum! Vit vænta, at frelsarin skal koma. Vit vænta hann við gleði og bivandi eyðmýkt. Og vit vita, at tá ið hann kemur, so kemur hann sigrandi.

*Eg eri byrjanin og endin*, sigur Harrin Gud, hann sum er og sum var og sum kemur, hin alvaldi, og tá fer hann úr øllum ættum at savna um trónu sína øll tey, sum hava trúð á hann.

*Úr eystri og vestri brátt,*
*úr suðri og norðri við,*
*tey sessast skjótt mong, við Jesusar borð*
*og ognast um ævir frið.*
*Tey skoða hans yndisbrá*
*og mettast við sælu tá,*
*syngja fagran takkarsong*
*til Jesus dýrdarkong.*

*t.* týddi.

---

Tá ið Gud sendi kæra son sín inn í verðina, legði hann syndina hjá øllum menniskjum á sonin og segði: "Ver svíkjarin Pætur, spottarin og yvirgangskroppurin Paulus, ver hjúnabandsbrótarin Dávid, ver syndarin, sum át súreplið í paradísinum, ver ránsmaðurin á krossinum – stutt og greitt: Ver persónurin fyri hvørt einstakt menniskja, ver tann, sum hevur gjørt syndirnar hjá øllum menniskjum, og síggj til, at tú rindar fyri tær til fulnar." (Luther).

*e.c.* ums.

# Javnvág í lívinum

Summi gera nógv burturúr at hava javnvág í lívinum. Tað kann snúgva seg um venjing og hvíld, arbeiði og frítíð og sunnan mat og drekka. Paulus ápostul fann sín egna form fyri javnvág. Hann merkti at kroppurin eldist og viknaði, men hetta varð uppvigað av, at hansara innara menniskja, tað sum livir í Gudi, varð endurnýggjað og vaks. Hann visti, hvat av hesum báðum fór at yvirliva – likamið ella andin.

Ein gamal sálmur lýsir støðuna soleiðis:

*Brátt eru heima vit við Guds trúnu,*
*hvat sakar tá, um sólin okkum sveið?*
*Tá tjaldbúð fellur, vit fáa krúnu,*
*og gloymd er neyðin øll á foldarleið.*

---

Ein muslimur í Algeria greiðir soleiðis frá:

Eg havi skilt, at Jesus Kristus er vegurin, sannleikin og lívið, og at hann er einasta viðgerðin, Gud hevur givið okkum móti syndini. Tá eg sá tað, bað eg: "Harri Jesus, mær tørvar teg. Eg veit, at eg havi verið langt burturi frá tær, og at eg havi gjørt mangt skeivt. Túsund tøkk fyri, at tú doyði á krossinum fyri syndir mínar. Nú lati eg mítt hjarta upp fyri tær og taki ímóti tær sum Harra og Frelsara. Ger meg til ein mann, sum ger vilja tín."

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 31.jan. | Tekstur: | Matt.4,18-22; | bíbliuorð: | Matt.4,19 |
| 7.febr. | Tekstur: | Matt.4,1-11; | bíbliuorð: | Matt.4,10b |
| 14.febr. | Tekstur: | Matt.5,1og 7,1-6+12 og Mark.6,30-31; | bíbliuorð: | Matt.7,12 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




*Nr. 4* *14. februar 2016* *76. árg.*

# Gud veitir miskunn

*Tað stendur tí ikki til hansara, sum vil, ikki heldur til hansara, sum rennur, men til Guds, sum veitir miskunn.*
*Róm. 9,16.*

Hava vit ein frían vilja? Ella er viljin bundin? Ivaleyst fer orðaskiftið um tann spurningin at halda fram, so leingi menniskju eru á jørðini. Sjálvandi hava vit ein frían vilja, siga summi. Í mongum viðurskiftum velja vit sjálvi, tí skilja vit ikki spurningin um hin trælbundna viljan. Jesus spurdi tó tann sjúka við Betesda-hylin: "Vilt tú verða frískur?" Og við tann blinda uttan fyri Jeriko segði hann: "Hvat vilt tú, at eg skal gera tær?"

"Gev Gudi vilja tín, allan vilja tín," verður sungið í einum sangi, og hugsanin má vera, at viljin er fríur.

Nei, tað er fløktari enn so, halda onnur. Um vilji mín er fríur, hví geri eg ikki tað góða, sum eg kann? Um eg vil trúgva á Gud, hví eri eg so ikki førur fyri tí? Um eg vil standa stinnur og sigra, hví er tað so ikki møguligt at gera tað, sum eg fegin vil?

Man Paulus ikki hava púra rætt, tá ið hann sigur, "tað stendur tí ikki til hansara, sum vil, ikki heldur til hansara, sum rennur, men til Guds, sum veitir miskunn." Hann sker tingini út í papp, og tað er mangan neyðugt, fyri at geva okkum okkurt at hugsa um. – Um vit knarra um, at ábyrgdin verður tikin frá okkum við hansara hvøssu orðingum, so misskilja vit støðuna. Tað, sum hann vil hava fram, er, at Gud tekur á seg ábyrgdina av, at vit kunnu verða frelst. Tí er ábyrgdin fyri, at Gud sleppur at ráða yvir frelsu okkara, løgd yvir á okkum. Tað veldst ikki

um ógvisliga stremban frá okkara síðu, men eina um Gud, sum sýnir miskunn. Ella sagt á ein annan hátt, tað veldst um, um vit vilja fara til Guds við øllum, sum bindur okkum, og biðja hann um at loysa okkum úr valdi myrkursins og leiða okkum inn í veruliga frælsið.

Hetta er ein frígerandi sannleiki, sum Paulus boðar okkum.

*Er tað tá beint, at tú longur vil vera*
*har, sum tær halda tey hindrandi bond?*
*Jesus teg frían og reinan vil gera,*
*alt verður bøtt av hans frelsandi hond.*

# Takksemi

*Og alt, hvat tit so gera í orði ella verki, gerið tað alt í Harrans Jesu navni, takkandi Gudi faðiri við honum.* *Kol. 3,17.*

Her snýr tað seg um takksemi. Og takksemi er í mongum føri eitt løgið fyribrigdi. Tað eru menniskju, sum eru sjúk og vita, at tey ikki hava langa tíð eftir. Og kortini kunnu tey vera takksom. Tey kunnu vera takksom fyri hvønn tíma, sum sólin skínur inn ígjøgnum stovuvindeygað og vermir. Tey kunnu gleða seg um kláru luftina og ljósa himmalin ein vetrardag.

Somuleiðis eru tað fólk, sum liva í trongum korum og hvørs lívsdreymar brustu. Og kortini eru tey takksom. Takksom fyri vinirnar, sum ikki sviku, tá ið hjúnafelagin rýmdi. Takksom fyri nýggjar dyr, sum lótu seg upp, tá ið viðkomandi misti arbeiðið.

So eru tað uppaftur onnur, sum hava alt og kortini ikki sýna nakað takksemi. Hús og heim, familju og vinir, viðgongd og viðurkenning og harafturat góða heilsu. Men kortini síggja vit ikki altíð nakað til takksemi. Kanska tí vit sammeta okkum við tey, sum hava meira enn vit sjálvi, fram um tey ómetaliga mongu, sum hava minni av øllum. Ella sum ein amerikanskur sjónleikari segði: “Ver takksamur fyri tað, tú hevur, og tað fer at enda við, at tú fært meira. Men um tankarnir bara fara at snúgva seg um tað, tú ikki hevur, fer tað at enda við, at tú ongantíð fært nógmikið.”

Takksemi er ikki ein stemningur, sum vit kunnu tvinga fram. Og kortini er har okkurt, sum vit kunnu læra og venja okkum til. Vit kunnu bera tøkk okkara fram við orðum. Bíbliuorðið her omanfyri talar um, at vit skulu SIGA Gudi tøkk í bønum okkara.

Vit kunnu t. d. byrja og enda hvønn dag við at frambera eina tøkk til Guds. Kanska er meira at vera takksamur fyri, enn vit av fyrstan tíð hildu.

*Harranum lovið alvaldandi Drotti við æru!*
*Honum tú lova, mín sál, og á fund hans tú fari!*

# Fríi vitnisburðurin

Fríi vitnisburðurin er sum ein lýsandi viti, og hann gevur meinigheitini ein frískleika. Í einum sangi hjá Fanny Crosby verður sungið so:

*Kom, sig eitt orð um Jesus,*
*tín vin og Frelsara,*
*sig frá, sig frá um hvussu,*
*tú komst til hansara!*

*Kom, sig eitt orð um Jesus!*
*Vit styrkjast øll harvið;*
*eitt lítið orð um Jesus,*
*syng, vitna ella bið!*

Orðið vendir ikki tómt aftur, tað eiga vit lyfti um. Øll skulu eiga høvi til at vitna. Jesus sigur, at vit skulu vera hansara vitni. Har stendur einki um, at bara tey, sum duga so væl at málbera seg, skulu vitna, tvørturímóti.

Paulus sigur eisini: "Kristus sendi meg út at boða gleðiboðskapin, ikki í orðavísdómi..." (1. Kor. 1,17). Tað skal gerast so einfalt, at tú røkkur teimum, sum eru longst niðri. Tá ið tað verður so háfloygt og fínt, fært tú skjótt kensluna av, at tú hevur megnað alt hetta, og tá slóknar andin, tí Harrin stendur teimum hugmóðigu ímóti. (Ják. 4,6). Tað, sum lítð var fyri verðini, útvaldi Gud sær, (1. Kor. 1,27) tí hann hyggur at hjartanum. Tann, sum bara fekk eina talent, skal hava loyvi at brúka hana, tí Gud kravdi eisini at fáa rentur frá honum. (Matt. 25,24-30). Tann, sum nógv hevur fingið litið til, frá honum verður kravt upp aftur meira. (Luk. 12,48).

Má Harrin gera tað so, at fríi vitnisburðurin ongantíð tagnar okkara millum, tí nógv eru vorðin frelst gjøgnum fría vitnisburðin.

*Effie Campbell* umsetti.

# Ristur í Guds hendur

Tað var ein útlendskur siður, at tá ið tað var okkurt, tú skuldi minnast, so skrivaðu tey tað við kriti í hondina. Og var tað so okkurt serligt, tú ikki skuldi gloyma, skrivaðu tey tað í báðar hendur. Tá ið tú rørdi hondina, sást tú tað, sum skrivað var, og tú hugsaði beinanvegin um tað.

Soleiðis – myndaliga talað – ber Gud seg at við teimum, hann er góður við. *Hann skrivar navn okkara í báðar hendur sínar! Hann gloymir okkum ongantíð. Hann hugsar altíð um okkum*. Tá ið tað onkuntíð tykist okkum, sum Gud hevur gloymt okkum, so er tað so styrkjandi fyri trúnna at minnast hetta vælsignaða orðið.

Hetta orðið troystaði ein sjúkur biskupur seg við. Harðliga royndur av ringari sjúku, skrivaði hann: *"Mangan roynir Gud børn síni við pínu og agar okkum upp undir krossi og líðing; men hann gloymir okkum ikki, ímeðan vit líða, og hann letur okkum ongantíð fara úr hjarta sínum!"*

Søk tí hjálp og troyst í Guds náðiríka lyfti: *"Sí, í mína hond havi eg rist teg!"*

*Ritaður eri eg í tínar hendur –*<br>
*tað er mín uggi, ið framá meg ber,*<br>
*inntil mín sál hjá tær einaferð lendir,*<br>
*lúgvað og troytt eftir drúgvari ferð.*

*t.* týddi.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 14.febr. | Tekstur: | Matt.5,1 og 7,1-6+12 og Mark.6,30-31; | bíbliuorð: | Matt.7,12 |
| 21.febr. | Tekstur: | 1.Sám.9,2+15-17+21-23 10,1+5-10;11,15;13,9-14; | bíbliuorð: | 1.Sám.3,9 |
| 28.febr. | Tekstur: | 1.Sám.16,1-3+6-13+ 19-23; | bíbliuorð: | Sálm.16,7b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74